KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 31.05.2018 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Tummas J. Lervig, Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen og Herfrí J. Sørensen.

Varalimir: Svein Rógvi Ljósstein møtti fyri Beintu Klakstein, og Jóhann Lützen møtti fyri Steinbjørn O. Jacobsen.

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
51/18	18/00668-6	Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundinum (Beinta Klakstein)
52/18	18/00702-2	Býráðslimur burturstaddur (Steinbjørn O. Jacobsen)
53/18	18/00628-1	Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2017 - Klaksvíkar kommuna
54/18	18/00543-4	Val av limi í Føroyagrunnin frá 1971
55/18	12/00932-34	Gamligarður - leigusáttmáli við Norðoya Kunningarstovu
56/18	18/00195-7	Leingjan av leigusáttmála matr. 1658d – Sp/f Stórá
57/18	18/00502-2	Marknaumskipan - neystagrundir á Bumshamri
58/18	18/00558-1	Nýtt tyrvingarøki í Klaksvík

51/18
18/00668-6 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundinum (Beinta Klakstein)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	31.05.2018	51/18	

Frágreiðing um málið:
Beinta Klakstein, býráðslimur, hevur boðað frá, at henni berst frá at møta á býráðsfundinum 31. mai 2018.

Lógargrundarlag:
- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 1:
  Berst kommunustýrislimi frá at møta á kommunustýrisfundi vegna heilsustøðu, kunnu teir limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.

Viðmerkingarnar til greinina áseta, at talan kann verða bæði um egna heilsustøðu og um heilsustøðuna hjá barni hjá kommunustýrisliminum.

- Kommunustýrislógin, § 18, stk. 3:
  Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samsýning til tiltakslim.

Tilmæli:
Býráðið verður at taka støðu til, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Býráðsins samtykt 31-05-2018
Einmælt samtykt at lata Svein Rógva Ljósstein taka sæti í býráðnum til fundin.

52/18
18/00702-2 Býráðslimur burturstaddur (Steinbjørn O. Jacobsen)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	31.05.2018	52/18	

Frágreiðing um málið:
Steinbjørn O. Jacobsen, býráðslimur, hevur boðað frá, at hann hevur lógligt forfall til býráðsfundin 31. mai 2018 og ynskir, at næstvaldi á valevnislistanum fær fundarboð í staðin.
Sambært skrivi frá Valnevndini 9. nov. 2016 er næstvaldi á valevnislistanum Óluva Klettskarð, men henni berst frá at møta á fundinum; annar næstvaldi á valevnislistanum er Jóhann Lützen.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin § 18, stk. 1 og stk. 3.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samsýning til tiltakslim.

Tilmæli:
Mælt verður til, at annar næstvaldi á valevnislistanum fær loyvi at taka sæti í býráðnum á fundinum 31. mai 2018 fyri Steinbjørn O. Jacobsen.

Býráðsins samtykt 31-05-2018
Eimælt samtykt at lata Jóhann Lützen taka sæti í býráðnum til fundin.

53/18
18/00628-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2017 - Klaksvíkar kommuna

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	29.05.2018	49/18	
2 Klaksvíkar Býráð	31.05.2018	53/18	

Frágreiðing um málið:
Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verða roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.

Sambært § 46 í kommunustýrislógini skal býráðið eisini taka støðu til val av grannskoðara. Greinin er soljóðandi:

> *"Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur.*
> *Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum".*

Umsitingin hevur sett seg í samband við 3 fyritøkur um at koma við tilboði v.m. upp á at grannskoða kommunuroknskapin. Freistin fyri innlating er mánadagin 28. mai kl. 15, og verður tilfarið lagt fyri fíggjarnevndina.

Roknskapur – uppskot (fylgiskjal 1)
Grannskoðanin hevur viðmerkingar á s. 8 í átekningini viðv. eldarsamstarvinum. Hetta er sama viðmerking sum í 2016. Víst verður til niðast á síðu 8 og ovast s. 9.
Víst verður til fylgiskjal 1 við roknskapinum (76 síður).

Protokollin – uppskot (fylgiskjal 2)
Grannskoðanarprotokollin er ikki liðug, men í fylgiskjali 2 eru talvur, sum koma at standa í protokollini.

Innanhýsis talvur
Á síðu 2-4 eru talvurnar dagførdar, sum vit plaga at leggja fyri fíggjarnevndina í samband við kunning og uppfylging av roknskapinum – serliga nýtsla í mun til játtan.

Fíggjarætlanin 2017

Roknskapur pr. 31-12-2017 (útskrivað 25-05-2018)				
		Uppruna	Eykajáttanir	Dagførd
1000.kr.		ætlan	netto	ætlan
§ 20	Inntøkur	247.000.000	0	247.000.000
§ 1-7.	Rakstur	175.384.000	7.085.000	182.469.000
		71.616.000	-7.085.000	64.531.000
§ 1-7.	Íløgur	53.000.000	43.530.000	96.530.000
		18.616.000	-50.615.000	-31.999.000
§ 20	Rentustuðul	4.500.000	0	4.500.000
		14.116.000	-50.615.000	-36.499.000
§ 20	Rentur	6.100.000	0	6.100.000
	Úrslit áðrenn avdráttir	**8.016.000**	**-50.615.000**	**-42.599.000**
	Avdráttir	**8.016.000**	**-5.516.000**	**2.500.000**
	Úrslit eftir avdráttir	**0**	**-45.099.000**	**-45.099.000**

Roknskapur 2017 – samandráttur av inntøkum, rakstur, íløgum og rentum

Roknskapur pr. 31-12-2017 (útskrivað 25-05-2018)						
		Uppruna		Dagført	Roknskapur	
1000.kr.		ætlan	Eykajáttanir	ætlan	R 31-12-2017	Pct.
§ 20	Inntøkur	247.000.000	0	247.000.000	267.866.866	108,4
§ 1-7.	Rakstur	175.384.000	7.085.000	182.469.000	188.957.303	103,6
		71.616.000	7.085.000	64.531.000	78.909.563	122,3
§ 1-7.	Íløgur	53.000.000	43.530.000	96.530.000	78.426.972	81,2
		18.616.000	50.615.000	-31.999.000	482.591	-1,5
§ 20	Rentustuðul	4.500.000	0	4.500.000	3.727.602	82,8
		14.116.000	50.615.000	-36.499.000	-3.245.011	8,9
§ 20	Rentur	6.100.000	0	6.100.000	9.299.450	152,4
	Úrslit áðrenn avdráttir	**8.016.000**	**50.615.000**	**-42.599.000**	**-12.544.461**	**29,4**
	Avdráttir	8.016.000	-5.516.000	2.500.000	2.809.089	
	Úrslit eftir avdráttir	**0**	**45.099.000**	**-45.099.000**	**-15.353.550**	

Rakstur (í fylgiskjali 3 er raksturin útgreinaður á deildir/rakstrarstøð)

Roknskapur pr. 31-12-2017 (útskrivað 25-05-2018)						
		Uppruna		Dagført	Roknskapur	
	RAKSTUR	ætlan	Eykajáttanir	ætlan	R 31-12-2017	Pct.
§ 1.	Kommunal fyrisiting	18.143.000		18.143.000	21.165.804	116,7
§ 2.	Almanna- og heilsumál	68.366.000	1.026.000	69.392.000	67.987.642	98,0
§ 3.	Børn og ung	36.721.000	-425.000	36.296.000	36.632.359	100,9
§ 4.	Undirvísing	9.584.000	-30.000	9.554.000	9.649.352	101,0
§ 5.	Mentan og frítið	10.841.000	6.500.000	17.341.000	17.998.872	103,8
§ 6.	Teknisk mál	19.250.000	14.000	19.264.000	19.498.148	101,2
§ 7.	Kommunal virki	12.479.000		12.479.000	16.025.124	128,4
	Rakstrarútreiðslur	175.384.000	7.085.000	182.469.000	188.957.303	103,6

Íløgur (í fylgiskjali 4 eru íløgurnar útgreinaðar á deildir/rakstrarstøð)

Roknskapur pr. 31-12-2017 (útskrivað 25-05-2018)						
		Uppruna		Dagført	Roknskapur	
	ÍLØGUR	ætlan	Eykajáttanir	ætlan	R 31-12-2017	Pct.
§ 1.	Kommunal fyrisiting	0		0	0	0,0
§ 2.	Almanna- og heilsumál	0	550.000	550.000	584.375	106,3
§ 3.	Børn og ung	0	3.980.000	3.980.000	4.877.395	122,5
§ 4.	Undirvísing	23.000.000	800.000	23.800.000	22.150.975	93,1
§ 5.	Mentan og frítið	6.100.000	15.100.000	21.200.000	4.471.749	21,1
§ 6.	Teknisk mál	20.400.000	18.600.000	39.000.000	37.363.925	95,8
§ 7.	Kommunal virki	3.500.000	4.500.000	8.000.000	8.978.553	112,2
	Íløgur	53.000.000	43.530.000	96.530.000	78.426.972	81,2

Rentustuðul

Roknskapur pr. 31-12-2017 (útskrivað 25-05-2018)						
		Uppruna		Dagført	Roknskapur	
		ætlan	Eykajáttanir	ætlan	R 31-12-2017	Pct.
§ 20	Rentustuðul bústaðir	4.500.000	0	4.500.000	3.727.602	82,8

Rentugjaldingar og rentuinntøkur (íroknað kurstap í samband við umfígging)

Roknskapur pr. 31-12-2017 (útskrivað 25-05-2018)						
		Uppruna		Dagført	Roknskapur	
		ætlan	Eykajáttanir	ætlan	R 31-12-2017	Pct.
§ 20	Rentugjaldingar (útreiðslur)	6.200.000	0	6.200.000	9.415.956	151,9
§ 20	Rentugjaldingar (inntøkur)	-100.000	0	-100.000	-116.506	116,5
	Rentur	6.100.000		6.100.000	9.299.450	152,4

Skattainntøkur

Roknskapur pr. 31-12-2017 (útskrivað 25-05-2018)						
		Uppruna		Dagført	Roknskapur	
		ætlan	Eykajáttanir	ætlan	R 31-12-2017	Pct.
§ 20.	Kommunuskattur	191.000.000	0	191.000.000	199.141.915	104,3
§ 20	Húsaleiguskattur	0	0	0	165.421	
§ 20	Felagsskattur	12.000.000	0	12.000.000	22.313.967	185,9
§ 20	Avgjald av kapitaleftirlønum	0	0	0	0	
§ 20	Skattur av eftirlønarinngjøldum	31.600.000	0	31.600.000	34.398.151	108,9
§ 20	Aðrar inntøkur/útreiðslur	0	0	0	0	
§ 20	Flyting vegna DIS, FAS og fradr	12.400.000	0	12.400.000	11.847.412	95,5
	Tíðaravmarkað flyting eldraøkið	0	0	0	0	
	Inntøkur	247.000.000	0	247.000.000	267.866.866	108,4

Fylgiskjøl

1. Uppskot til ársroknskap
2. Uppskot til protokoll við tølum – teksturin er ávegis
3. Budgetsaldulistar rakstur pr. 31-12-2017 - (útskrivað 25-05-2018)
4. Budgetsaldulistar íløgur pr. 31-12-2017 - (útskrivað 25-05-2018)
5. Budgetsaldulistar rakstur + íløgur + inntøkur pr. 31-12-2017 - (útskrivað 25-05-2018)

Lógargrundarlag:

§ 46. Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur.

Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum.

Fíggjarligar avleiðingar:

Roknskapurin vísir 12,5 mió. kr. í halli, og eftir avdráttir er hallið 15,3 mió. kr. Inntøkurnar eru 167,8 mió. kr., sum er 20,8 mió. kr. meira enn mett. Innistandandi er 17,9 mió. kr., men um vit írokna áognina í samband við NBH, er innistandandi 52,8 mió. kr.

Bruttoskuldin er 126 mió. kr. og nettoskuldin 62 mió. kr., sum svarar til 0,29 í mun til álíkningina.

Tilmæli:

Mælt verður til, at fíggjarnevndin góðtekur uppskotini um roknskap og protokoll og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna.

Fíggjarnevndin viðger eisini innkomna tilfarið frá fyritøkum, sum hava áhuga at grannskoða roknskapin hjá kommununi.

FíN 29-05-2018

Nevndin tekur undir við uppskotinum og mælir til, at roknskapurin verður góðkendur og undirskrivaður.

Býráðsins samtykt 31-05-2018

Grannskoðaði ársroknskapurin fyri 2017 við tilhoyrandi grannskoðanarprotokoll einmælt góðkendur.

Harumframt einmælt samtykt at lata SPEKT halda fram sum grannskoðari kommununnar.

54/18
18/00543-4 Val av limi í Føroyagrunnin frá 1971

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	29.05.2018	50/18	
2 Klaksvíkar Býráð	31.05.2018	54/18	

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá Fíggjarmálaráðnum dagf. 1. mai 2018 verður heitt á Klaksvíkar kommunu innan 1. juni at innstilla minst trý evni til nevndina í Føroyagrunninum.

Heitt verður eisini á kommununa um at taka atlit til javnstøðu millum kynini og innstilla bæði kvinnur og menn.

Í løtuni er Hergerð Joensen vald sum stýrislimur, og hennara skeið endar 1. august 2018.

Viðtøkurnar fyri Føroyagrunnin áseta, at tann eini limurin í nevndini, ið landstýriskvinnan tilnevnir, skal verða útnevndur eftir innstilling frá Klaksvíkar kommunu.

Málið var fyri á fíggjarnevndarfundi 22-05-2018. Av tí at eitt evni, ið varð skotið upp, hevur boðað frá, at viðkomandi ikki ynskir at verða tilnevndur, verður málið viðgjørt av nýggjum.

Hjálagdar eru viðtøkur fyri Føroyagrunnin frá 1971.

Lógargrundarlag:
Viðtøkur fyri Føroyagrunnin frá 1971.

Tilmæli:
Verður hervið heitt á fíggjarnevndina at innstilla trý evni til stýrið fyri Føroyagrunnin.

FíN 29-05-2018
Nevndin innstillar hesi trý evni: Hilmar Danielsen, Súsanna Olsen og Ragnar Joensen.

Býráðsins samtykt 31-05-2018
Tilmælið frá FíN 29-05-2018 einmælt samtykt.

55/18
12/00932-34 Gamligarður - leigusáttmáli við Norðoya Kunningarstovu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.05.2018	53/18	
2 Fíggjarnevndin	22.05.2018	42/18	
3 Svínoyarnevndin	30.05.2018	K-3/18	
4 Klaksvíkar Býráð	31.05.2018	55/18	

Frágreiðing um málið:

Viðlagt er uppskot til leigusáttmála millum Klaksvíkar kommunu og Norðoya kunningarstovu um Gamlagarð.

Fíggjarligar avleiðingar:
Enn er ikki greitt, hvørjar inntøkurnar verða av hesi royndarskipan.

Tilmæli:
Málið verður lagt fyri støðutakan.

UBN 14-05-2018
Nevndin tekur undir við leigusáttmálanum millum Kl. kommunu og Norðoya Kunningarstovu av "Gamlagarði". Málið verður at taka upp aftur í oktober 2018. Nevndin beinir málið í Svínoyarnevndina til kunningar.

FíN 22-05-2018
Nevndin tekur undir við UBN 14-05-2018.

SvN 30-05-2018
Málið verið til kunning.

Býráðsins samtykt 31-05-2018
Tilmælið frá FíN 22-05-2018 einmælt samtykt.

56/18
18/00195-7 Leingjan av leigusáttmála matr. 1658d – Sp/f Stórá

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.05.2018	47/18	
2 Havna- og Vinnunevndin	14.05.2018	15/18	
3 Fíggjarnevndin	22.05.2018	44/18	
4 Klaksvíkar Býráð	31.05.2018	56/18	

Frágreiðing um málið:
Málið um leingjan av leigusáttmála við Sp/f Stórá var til viðgerðar í februar umfarinum við hesum tilmæli: *Mælt verður til at taka undir við málinum og dagføra sáttmálan við leiguøkið, navnabroyting og galdandi prísum fyri lendisleigu.*

Fíggjarnevndin beindi málið aftur í umsitingina og mælti til: *at umsitingin ger greiðar reglur fyri, nær leigusáttmálar verða lagdir fyri nevnd.*

Umsitingin metir, at greiðar reglur eru fyri, nær leigusáttmálar verða lagdir fyri nevnd.

> **Smb. kommunustýrisskipanini § 14, 3. petti:** *"Fíggjarnevndin sendir **býráðnum** tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum, veðseting og um burturleigu í meira enn fimm ár av ognum kommununnar."*

Smb. kommunustýrisskipanini § 27, 7. petti: Umhvørvis- og býarskipanarnevndin (UBN)
..”sendir fíggjarnevndini tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum og um burturleigu í meira enn fimm ár.”

Sáttmálin er upprunaliga gjørdur at galda í 20 ár til 31. desember 2030, men kann uppsigast av leigara við 1 árs fyrivarni til ein 1. januar. Tó kann kommunan í fyrsta lagi siga leigumálið upp til tann 31. desember 2030.

Herumframt er í grein 3 ásett: *Verða – í sáttmálatíðarskeiðnum – nýggir prísir ásettir, verða samráðingar tiknar upp við leigaran um hetta*.

Umsitingin metir, at um tíðarskeiðið skal leingjast, eigur leiguprísurin at dagførast samsvarandi galdandi prísum, sum komu í gildi 1. januar 2018. Samband hevur verið við leigaran um hetta, og tekur hann undir við, at prísirnir verða broyttir samsvarandi hesum.

Við hesum grundarlagi mælir umsitingin til at leingja sáttmálan til 31. november 2040.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrisskipanin, sum seinast dagførd 26.10.2017, § 14, 3. petti og § 27, 7. petti

Fíggjarligar avleiðingar:
Árligi leigukostnaðurin hækkar við kr. 2.253,60

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við málinum og dagføra leigusáttmálan.

UBN 14-05-2018
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagf. 19-04-2018.

HaVN 14-05-2018
Nevndin tekur undir við UBN 14-05-2018.
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

FíN 22-05-2018
Nevndin tekur undir við UBN og HaVN 14-05-2018.

Býráðsins samtykt 31-05-2018
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Tilmælið frá FíN 22-05-2018 einmælt samtykt.

57/18
18/00502-2 Marknaumskipan - neystagrundir á Bumshamri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.05.2018	49/18	
2 Havna- og Vinnunevndin	14.05.2018	K-13/18	
3 Klaksvíkar Býráð	31.05.2018	57/18	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til umsókn um marknaumskipan móttikin 17. apríl 2018.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m. sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 25. mai 2009.

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert tilmælandi partur.

Tilmæli:
Mælt verður til at senda Umhvørvisstovuni málið við viðmæli um at góðkenna marknaumskipanina.

UBN 14-05-2018
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagf. 19-04-2018.

HaVN 14-05-2018
Málið verið til kunning.

Býráðsins samtykt 31-05-2018
Tilmælið frá UBN 14-05-2018 eimælt samtykt.

58/18
18/00558-1 Nýtt tyrvingarøki í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	14.05.2018	51/18	
2 Havna- og Vinnunevndin	14.05.2018	16/18	
3 Tekniska Nevnd	16.05.2018	25/18	
4 Fíggjarnevndin	22.05.2018	48/18	
5 Ánanevndin	29.05.2018	5/18	
6 Klaksvíkar Býráð	31.05.2018	58/18	

Frágreiðing um málið:
Vísandi til trupulleikan í samband við tyrvingina í Árnafirði hevur tekniska fyrisiting eftir umbøn frá formanninum í UBN kannað umstøðurnar á tyrvingarplássinum. Tekniska fyrisiting hevur verið á staðnum og metir, at rættast er at finna nýtt tyrvingarpláss. Metingin er gjørd við serligum atliti til tungu ferðsluna, sum dagliga skal gjøgnum tunnilin, og tí kann vera við til at tarna aðrari ferðslu.

Harafturat verður mett, at tyrvingarøkið er um at verða fylt, og tí má nýggj hóskandi loysn finnast skjótast gjørligt.

Nýtt tyrvingarpláss
Tekniska fyrisiting hevur saman við havna- og vinnudeildini umrøtt spurningin um, hvar nýtt tyrvingarøki kann gerast. Tey umrøddu økini eru Uppi á Fossum, Norðhavnin og møguliga í gamla grótbrotinum á Bumshamri.

Uppi á Fossum: Ferðsluliga er hetta ikki ein góð loysn, orsakað av tí tungu ferðsluni, ið skal gjøgnum sethúsaøki.

Gamla grótbrotið á Bumshamri: Hetta krevur, at bingjuplássið verður flutt til eitt annað stað.

Norðhavnin: Mett verður, at mest fæst burturúr við at fara í Norðhavnina. Samstundis verður møguleiki fyri eini útbygging av havnini norðureftir.

Áðrenn málið endaliga kann fara í gongd, er ynskiligt, at nevndirnar siga sína hugsan um møguliga staðseting. Um nevndirnar velja økið í Norðhavnini, fer umsitingin beinanvegin undir at kanna og fáa til vega neyðugu heimildirnar, í samráð við umhvørvismyndugleikar og annað.

Lógargrundarlag:
Umhvørvisverndarlógin, Havumhvørvislógin og Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

Fíggjarligar avleiðingar:
Pengar frá *eyrmóttøku kr. 100.000* flytast til kanningararbeiðið at gera tyrvingarpláss í Norðhavnini.

Tilmæli:
Mælt verður til, at tekniska fyrisiting fær heimild at kanna møguleikarnar fyri at staðseta tyrvingarpláss í Norðhavnini.

UBN 14-05-2018
Ein meiriluti, Óli M. Lassen, Tummas J. Lervig og Signhild V. Johannesen, tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 08-05-2018.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Beinir Johannesen, beinir málið í Ánanevndina

HaVN 14-05-2018
Ein meiriluti, Tummas J. Lervig , Beinta Klakstein og Óli M. Lassen, tekur undir við meirilutanum í UBN 14-05-2018.
Ein minniluti, Beinir Johannesen og Atli S. Justinussen, tekur undir við minnilutanum í UBN 14-05-2018.

TN 16-05-2018
Ein meiriluti, Óli M. Lassen, Tummas J. Lervig og Beinta Klakstein, tekur undir við meirilutanum í UBN og HaVN 14-05-2018.
Ein minniluti, Atli S. Justinussen, tekur undir við minnilutanum í UBN og HaVN 14-05-2018.

FíN 22-05-2018
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við meirilutunum í UBN og HaVN 14-05-2018 og TN 16-05-2018.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Herfrí J. Sørensen, tekur undir við minnilutanum í UBN og HaVN 14-05-2018 og TN 16-05-2018.

ÁnN 29-05-2018
Nevndin tekur undir við málinum

Býráðsins samtykt 31-05-2018
Tilmælið frá meirilutanum í FíN 22-05-2018 einmælt samtykt.